# Sjáldsamur fiskur í Vági



Contender hjá Joe N. í Vági avreiddi í morgun henda sjáldsama fiskin til uppboðssøluna í Vági, skrivar Suðurrás. Okkurt kundi týtt uppá at hetta er ein Bramafiskur, tó hevur hann ikki gulligar uggafjarðar, ið slíkir fiskar hava sambært bókini „Fiskar í Føroyum".

# Áir eru til annað enn streymframleiðslu

- Ber ikki til at gera streym uttan at oyðileggja allar áirnar? Henda spurningin vilja fólk við Norðskála hava svaraðan. Tí skipa tey fyri fundi, har orka og umhvørvi verða lýst úr øllum sjónarhornum. Við á fundinum verða Anni á Hædd, deildarleiðari í Løgmálaráðnum, Hákun Djurhuus, stjóri í SEV, Anna Maria Fossá, deildarleiðari á Náttúrugripasavninum, Kári Thomsen, formaður í Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag, Jóhan í Niðristovu frá partafelagnum Røkt og eitt umboð fyri Lokal Agenda 21. Ein av fyriskiparunum Elsa Annika Olsen við Norðskála, sigur við Kringvarpið, at fólkini síggja orkumálini og umhvørvismálini úr ýmsum sjónarhornum og harafturat er talan um fakfólk, so tey fáa nógv at vita, sum koma á fundin í Skálanum í Norðskála-Oyrar skúla mikukvøldið klokkan 19.

# Leitaðu eftir føroyskum stuttleikabáti

**Um vikuskiftið varð leitað eftir einum føroyskum stuttleikabáti, sum var horvin á nveg úr Føroyum til Hetlands**

LEITING
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Leygardagin bað radiostøðin í Aberdeen skip og bátar siga frá, um tey sóu nakað til føroyska stuttleikabátin „Nina", sum var farin úr Føroyum seinnapartin hósdagin saman við einum øðrum stuttleikabáti, „Gerd". Ætlanin var, at bátarnir skuldu koma til Foula leygarnáttina, men tað vísti seg, at bara „Gerd" kom hagar. Tá var so mikið av vindi av landnyrðingi, at teir noyddust at fara til Scallooway.

Tá „Nina" ikki kom vegin fram leygardagin, settu teir á „Gerd" seg í samband við hetlendsku sjóverjuna. Sjóverjan spurdi seg fyri í fleiri havnum og royndi eisini at fáa samband við tann horvna bátin ígjøgnum fartelefon og VHF, men til fánýtis.

Hetlendska sjóverjan heitti so á skip og bátar um at siga frá, um tey sóu nakað til tann føroyska bátin, og MRCC-støðin í Han kom upp í leitingina. Eitt Nimrod-flogfar fór at leita á leiðini millum Føroyar og Hetland, og ein tyrla leitaði inni undir landi, samstundis sum radiostøðin í Aberdeen sendi út neyðboð.

Leygarkvøldið boðaði MRCC-støðin í Havn hetlendsku sjóverjuni frá, at manningin á „Ninu" hevði gjørt vart við seg umvegis fartelefonina. Tá var báturin staddur uttan fyri Stornoway, og alt visti væl við umborð.

### Lurta ikki á 16

Talskvinnan hjá hetlendsku sjóverjuni, Katrina Hampson, sigur við Shetland News, at tey eru sjálvandi fegin um, at teir báðir føroyingarnir komu afturíaftur í øllum góðum, men at tey eru eitt sindur ørkymlað av, at manningin ikki varnaðist ta umfatandi leitingina eftir teimum.

- Hóast bæði vit og teirra avvarandi gjørdu fleiri royndir at fáa samband við teir umvegis fartelefon og VHF, svaraðu teir ikki. Vit ætla okkum at fara til Scalloway at tosa við teir og at vissa okkum um, at teir eru vitandi um, hvussu umráðandi tað er at lurta eftir neyðkanalini altíð, sigur Katrina Hampson.

Robert Olsen, leiðari á MRCC Tórshavn, sigur, at bátar hava skyldu til vat lurta eftir kanal 16 altíð, tá siglt verður. Tíverri eru tað alt ov mong, sum gloyma tað, og tað er ein trupulleiki, sigur Robert Olsen.



*Seglbátarnir við bryggju í Vágsbotni*
*Mynd: Árni Joensen*

# Á filmsferð í Norðurhøvum

**Týskt filmslið skal gera film av náttúru og umhvørvi í Norðurhøvum**

FILMUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*
*myndir: Árni Joensen*

Týska ferðalagið, sum telir níggju fólk, kom til Føroya við flogfari, men tá ferðalagið fór úr Føroyum seinnapartin leygardagin, var tað við danska skipinum „Arctic Janus". Upprunaliga varð skipið bygt til grønlendska televerkið, men fyri nøkrum árum síðani varð tað selt til Danmarkar og er nú skrásett í Keypmannahavn.

Úr Føroyum gekk leiðin til Seyðisfjørðin í Íslandi, og tá filmsliðið er liðugt har, verður farið norður til Jan Mayen. Úr Jan Mayen fer „Arctic Janus" til Svalbard, har skipið skal gera ein avstingara norður á 80 stig. Síðani verður siglt til Noregs, har skipið skal inn í m. a. Tromsø, áðrenn ferðin endar í Danmark um ein góðan mánað. Tá er ætlanin, at filmsliðið skal hava tilfar til 180 minuttir.

15 fólk eru við „Arctic Janus" á ferðini. Av teimum eru tveir føroyingar, Páll Klein, sum er skipari, og Andras Andreasen, sum er stýrimaður.




*Teir báðir føroyingarnar við „Arctic Janus", Páll Klein, skipari og Andras Andreasen, stýrimaður*



# Falkur tettur og tættur

Á skipasmiðjuni í Havn hava teir nú tett holið, sum ísfiskatrolarin Falkur fekk niðan fyri vatngangin í bakborð, tá makkarin Heykur rendi á hann næstsíðsta sunnumorgun. Heykur er farin aftur til fiskiskap, men Falkur verður ikki liðugt umvældur fyrr enn um einar fjúrtan dagar.